gult cyan magenta svart

e-mail: jakup@sosialurin.fo

ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesi› eisini Internetsosialin á www.sosialurin.fo

Leikandi lætt hjá Rógva

Rógvi Johansen vann vi› gó›ari hjálp frá Shell li›num vi› f‡ra minuttum á fyrstu veruligu etapuni í Statoil Kring Føroyar

STEFAN Í SKORINI



mynd: Jens K. Vang

Ein fegin Rógvi Johansen eftir sigurin á fyrstu etapuni í Eysturoynni hósdagin

Eingin ivi var um úrsliti›, tá i› avtorna›i. Rógvi Johansen vann etapuna sannførandi, og var hann f‡ra minuttir frammanfyri næsta mann, sum var Jørgen Andersen. Gunnar Dahl-Olsen kom tri›jur á mál. Hesir koyra allir fyri Team Shell.

Jens Tousgaard stó› fyri tí fyrsta álopinum á etapuni í gjár. Hann fór frá hinum, tá i› súkklararnir vóru komnir til Ei›is, men Simon Borchmann frá Team Shell var skjótur aftaná. Sí›ani fór ein annar av Shell monnunum, Janus Jørgensen, eisini aftaná teimum bá›um, og ta› eydna›ist Simon og Janusi at ste›ga Jens Tousgaard, so at teir vór›u tiknir aftur.

Sí›ani fóru Rógvi Johansen og Simon Borchmann avsta› og fingu eina lei›slu uppá ein minutt. Teir lótu seg tó taka aftur av feltinum, og so fylgdust allir teir fremstu aftur. Sí›ani sleit Simon Borchmann seg aftur leysan á veg ni›an á Gøtuei›i, og Kenneth Gormsen fór aftaná.

Rógvi royndi at taka hesar aftur, men ikki fyrr enn súkklararnir høvdu veri› í Leirvík og komu ni›an á Gøtuei›i a›ru fer›, eydna›ist ta› Rógva at fáa hinar aftur. Tá var alt Shell li›i› savna› aftur saman vi› tí unga Jeppe Thing, sum royndi at hanga í hinum.

Eftir hetta koyrdi Team Shell sigurin heim uttan stórvegis trupulleikar. Rógvi gjørdist fremst, sí›ani komu Jørgen Andersen og Gunnar Dahl-Olsen, og Jeppe Thing gjørdist sera óvænta› nummar f‡ra. Eitt sera gott úrslit hjá tí unga dananum.

Aftur hesufer› vóru fyrireikararnir hepnir vi› ve›rinum, og naka› av fólki var› savna› vi› máli› í Saltangará.

Team Shell arbeiddi væl saman

Tríggir teir fremstu á etapuni vóru á Shell li›num, og allir fimm á li›num arbeiddu væl saman á allari etapuni, so at hinir súkklararnir ikki høvdu nakran møguleika at hótta Shell menninar. Allir súkkla›u fyri Rógva Johansen, og hann vann eisini vi› heili f‡ra minuttum. Jens Tousgaard, sum skuldi geva Rógva ta stinnastu mótstø›una, er nú seks minuttir aftanfyri Rógva.

Kappingin er nú avgjørd, tí at eingin kann taka teir f‡ra minuttirnar frá Rógva. Í gjár var einkultstartur á Sandoynni, har koyrt var 25 kilometrar. Rógvi er serfrø›ingur í slíkum teinum, og hann skuldi ikki havt nakran trupulleika vi› at vinna a›ru etapu á Sandoynni. Einkultstarturin er ein gó›ur møguleiki hjá Rógva at økja um lei›sluna.

Í dag ver›ur koyrt í Su›uroynni. Byrja› ver›ur á Tvøroyri, og súkkla› ver›ur su›ur til Sumba og nor›ur aftur til Vágs, har máli› er. Teinurin er 55 kilometrar. Súkklararnir skulu tvær fer›ir um Hestin, og ta› er óiva› tyngsta strekki›.

Kappingin endar í morgin vi› fjór›u og seinastu etapuni á Streymoynni. Koyrt ver›ur frá Tjørnuvík til Vestmanna og so ígjøgnum tunnellina til Havnar. Máli› ver›ur vi› Statoil stø›ina í Gundadali, har vinnararnir ver›a hei›ra›ir, og ta› ver›ur eftir øllum at døma Rógvi Johansen, sum fer at vinna Statoil Kring Føroyar sera trygt.

Statoil Kring Føroyar 2000, samla› úrslit eftir 1. etapu í Runavík

Plas.	RyggNr.	Navn	Eftirnavn	Felag	Tíð
1	1	Rógvi	Johansen	Team Shell	03.10.01
2	2	Jørgen	Andersen	Team Shell	03.14.08
3	3	Gunnar	Dahl-Olsen	Team Shell	03.14.25
4	14	Jeppe	Thing	Cycling Aarhus	03.15.49
5	6	Jens	Tousgaard	FIX Rødovre	03.15.56
6	8	Jóhann	Brend	CC Gladsaxe	03.16.08
7	4	Simon	Borchmann	Team Shell	03.17.22
8	10	Sverri	Mohr Edvinsson	Tórshavnar Súkklufelag	03.17.35
9	5	Janus	Jørgensen	Team Shell	03.19.17
10	7	Kenneth	Gormsen	CC Gladsaxe	03.19.20
11	9	Kári	Brattaberg	Tórshavnar Súkklufelag	03.26.17
12	13	Jákup	Johansen	Tórshavnar Súkklufelag	03.26.17
13	12	Tony	Ditlevsen	Roskilde Triathlon	03.36.56
14	15	Eyðun	Poulsen	Tórshavnar Súkklufelag	03.39.56
15	24	Remi	Lamhauge	Tórshavnar Súkklufelag	03.40.13
16	17	Esmar	Joensen	Tórshavnar Súkklufelag	03.42.56
17	16	Birthe	Dabelstein	Cycling Aarhus	03.43.09
18	11	Jørgen	Nielsen	Politiets Cykelclub	03.47.22
19	22	Evald	Rasmussen	Tórshavnar Súkklufelag	03.47.57
20	23	Kári	Simonsen	Tórshavnar Súkklufelag	03.48.00
21	18	Martin	Kortegaard	Odense Triathlon Klub	03.49.08
22	19	Christian	Guttesen	Tórshavnar Súkklufelag	04.01.45
23	21	Eli	Christiansen	Tórshavnar Súkklufelag	04.20.16

Statoil Kring Føroyar 2000, úrslit av 1. etapu í Runavík, 106 km

Plas.	RyggNr.	Navn	Eftirnavn	Felag	Tíð	Km/t
1	1	Rógvi	Johansen	Cycling Aarhus	03.06.16	34,1
2	2	Jørgen	Andersen	Cycling Aarhus	03.10.14	33,4
3	3	Gunnar	Dahl-Olsen	Tórshavnar Súkklufelag	03.10.33	33,4
4	14	Jeppe	Thing	Cycling Aarhus	03.11.46	33,2
5	6	Jens	Thousgaard	FIX Rødovre	03.12.10	33,1
6	8	Jóhann	Brend	CC Gladsaxe	03.12.10	33,1
7	10	Sverri	Mohr Edvinsson	Tórshavnar Súkklufelag	03.13.33	32,9
8	4	Simon	Borchmann	Hvidovre Atletik og motion	03.13.34	32,9
9	5	Janus	Jørgensen	Cycling Aarhus	03.15.25	32,6
10	7	Kenneth	Gormsen	CC Gladsaxe	03.15.25	32,6
11	9	Kári	Brattaberg	Tórshavnar Súkklufelag	03.17.54	32,1
12	13	Jákup	Johansen	Tórshavnar Súkklufelag	03.22.14	31,5
13	12	Tony	Ditlevsen	Roskilde Triathlon	03.32.49	29,9
14	15	Eyðun	Poulsen	Tórshavnar Súkklufelag	03.35.33	29,5
15	24	Remi	Lamhauge	Tórshavnar Súkklufelag	03.36.13	29,4
16	16	Birthe	Dabelstein	Cycling Aarhus	03.38.45	29,1
17	17	Esmar	Joensen	Tórshavnar Súkklufelag	03.38.47	29,1
18	11	Jørgen	Nielsen	Politiets Cykelklub	03.43.07	28,5
19	23	Kári	Simonsen	Tórshavnar Súkklufelag	03.43.41	28,4
20	22	Evald	Rasmussen	Tórshavnar Súkklufelag	03.43.42	28,4
21	18	Martin	Kortegaard	Odense Triathlon Klub	03.44.54	28,3
22	19	Christian	Guttesen	Tórshavnar Súkklufelag	03.57.34	26,8
23	21	Eli	Christiansen	Tórshavnar Súkklufelag	04.15.43	24,9

B36 slapp ikki at b‡ta um

Ætlanin hjá B36 var at b‡ta UEFA Cup dystirnar ímóti danska felagnum AB um, so at teir kundu leika heimadystin fyrst, men fótbóltssambandi› setti seg ímóti hesum

STEFAN Í SKORINI

Ta› kom eitt sindur dátt vi› hjá B36, tá i› ta› gjørdist greitt, at FSF ikki vildi ganga teirra ynski á møti um at b‡ta teir bá›ar UEFA Cup dystirnar um.

Sambært formanninum í B36, Kristjani á Neystabø, so var alt komi› uppá pláss. AB var sinna› at b‡ta dystirnar um, og DBU og UEFA høvdu eisini givi› grønt ljós. So skuldi ta› bara veri› ein formalitetur at fáa FSF at ganga vi› til at b‡ta dystirnar um. AB var áhuga› í at b‡ta dystirnar um, tí at so høvdu fleiri føroyingar komi› til dystin í Danmark.

Forma›urin í fótbóltssambandinum, Thorleif Sigur›sson, sigur, at lutakasti› laga›i seg so væl, at tey bæ›i føroysku li›ini í UEFA Cup, GÍ og B36, ikki leiktu á heimavølli í senn, og ta› hildu teir ikki var vert at broyta. Tí vi›mældu teir ikki UEFA, at loyva feløgunum at b‡ta dystirnar um. Thorleif sigur eisini, at ta› hev›i veri› sera óheppi›, um tvey føroysk feløg høvdu leikt so t‡dningarmiklar dystir á heimavølli sama dag.

Ein annar trupulleiki í hesum sambandi er, at GÍ hevur eisini valt at leika sín dyst ímóti Norrkøbing á Tórsvølli ísta›in fyri inni á Svangaskar›i.